FØROYA HANDILSSKÚLI

TEAM85

## Føroya Handilsskúli søkir eftir
# Lærarum

**til HH og FHS í Tórshavn frá 1. august 2006. Talan er um tíðaravmarkað størv skúlaárið 2006/2007. Hevur umsøkjari útbúgving í lærugreinum, sum hóska til tørv skúlans, kann talan tó verða um fast starv.**

**Hesir tímar eru leysir at søkja (tímatølini standa í klombrum og eru vegleiðandi):**
Danskt A (6 t/v), Dekoratión (3-6 t/v), Enskt C, B (4-8 t/v), Fyriskipan A (4 t/v), Føroyskt C (8 t/v), Kunningartøkni C (4 t/v), Samfelagslæra/Fiskivinna C (6 t/v), Sálarfrøði C (4 t/v), Støddfrøði D (4 t/v), Sølubúskapur C (12 t/v), Ungt virki (3 t/v), Vinnulívsrættur C (6 t/v), Virkisbúskapur C (12 t/v).

**Arbeiðsuppgávur:**
- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir
- luttaka í toymisarbeiði
- vera við í ráðlegging skúlans
- luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á A- og B-stigi.
- hevur viðkomandi útbúgving á bachelor-stigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á C-stigi.
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við at menna skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

**Vit kunnu m.a. bjóða:**
- eitt fakligt mennandi læringsumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu tvey árini verða roknað sum royndartíð. Lærarar, sum settir verða í fast starv, mugu vera til reiðar at fara undir kravda námsfrøðilga útbúgving skjótast gjørligt. Eisini hava teir skyldu at undirvísa í teimum lærugreinum, teir hava førleika til.

**Løn:**
Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi 26. mai 2006**. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Olav Absalonsen ella Sonju Oyrabø Petersen á telefon 317177, teldupostur: ***oa@hsh.fo*** ella ***sp@hsh.fo.***

*Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 á Fyrisiting, Handli og skrivstovu (FHS). Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 og á Kambsdali 20 lærarar. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, so sum HD og akademimerkonom.*

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374
Kambsdalur · 530 Fuglafjørður · Tel 444900 · Telefax 444901
**Heimasíða skúlans: www.fh.fo**





# Leys størv

### Pedagogar til Leikalundina í Nólsoy

Søkir eftir einum pedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. august 2006 ella eftir nærri avtalu, og eisini eftir einum pedagogi, fyri starvsfólk í barsilsfarloyvið, at byrja 1. august 2006.

Umsóknarfreist: Mánadagin 22. mai 2006.

Setanarviðurskifti: Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita við at venda sær til Lis Nolsø, stovnsleiðara, tlf. 302462.

### Pedagogur og varaleiðari til Kurl@

Søkir eftir einum varaleiðara at arbeiða 32 tímar um vikuna at byrja 1. august 2006 ella eftir nærri avtalu, og eisini eftir einum pedagogi at arbeiða 32 tímar um vikuna at byrja 7. august 2006 ella eftir nærri avtalu.

Umsóknarfreist: Leygardagin 27. mai 2006.

Setanarviðurskifti: Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita við at venda sær til Ann Jacobsen, stovnsleiðara á tlf. 353500.

**Les meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**





# Sosialráðgevarar
## til Norðoya deild

Á Almannastovuni arbeiða umleið 100 fólk, harav 5 starvast á økisdeildini í Norðoyggjum.

Hevur tú hug at royna teg í fjølbroyttum, avbjóðandi starvi í einum arbeiðsumhvørvi, sum er í støðugari menning? So er hetta nakað fyri teg. Á deildini hjá Almannastovuni í Klaksvík eru eitt fulltíðarstarv og eitt ¾ tíðar starv sum sosialráðgevari leys at søkja.

Nærri fæst at vita um størvini við at senda sær til Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, deildarleiðara, tel 457240 ella við at fara inn á heimasíðu okkara: almannastovan.fo ella á portal.fo. Umsóknarfreistin er 22. mai 2006.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 4780 80



# TIL SØLU



**Bátatrailari
Variant 1000 BB
total 1000 kg,
L 650 kg**

**17.500,-**

tlf. 212066


